J.nr.: F.K. 00-04-
Dato: 14. september 2006
Okkara ref. SSS/JFL
E-postur: fko@fuglakomm.fo
Heimasíða: www.fuglakomm.fo

# FUNDARFRÁSØGN

## frá býráðsfundi nr. 11/2006

Ár 2006 tann 14. september kl. 18.00 varð býráðsfundur hildin í býráðssalinumi, hetta sambært skriv frá borgarstjóranum, dagfest 08. september 2006 um innkalling til fundar.

**Møtt vórðu:**

Sigurð S. Simonsen
Gordon M. Petersen
Dánjal Vang
Signar á Brúnni
Kristina T. Larsen
Eyðun á Lakjuni
Jóhan Hansen
Jón Nolsøe Olsen
Petur Abrahamsen

Kristina T. Larsen møtti á fundi sum varalimur fyri Elisabeth D. Eldevig, Jóhan Hansen fyri Tórfríð Abrahamsen, sum bæði eru burturstødd, og Gordon M. Petersen fyri Jann Toftegaard, sum ikki kundi møta vegna arbeiðí.

Býráðið samtykti einmælt, at varalimirnir Kristina T. Larsen, Jóhan Hansen og Gordon M. Petersen taka sæti á býráðsfundinum fyri ávikavist Elisabeth D. Eldevig, Tórfríður Abrahamsen og Jann Toftegaard.

Skrivari: Jákup Frants Larsen, býráðsskrivari

**Mál nr. 38/2006.**

**Viðvíkjandi vatnreinsiverki á Hellunum.**

Fuglafjarðar kommuna hevur móttikið uppskot frá P/F Sofus M. Jakobsen, dagfest 22. juni 2006 um vatnreinsiverk á Hellunum.

Málið hevur verið til viðgerðar á fundi í teknisku nevndini tann 19. juli 2006, og mælir nevndin býráðnum til, at arbeiðið viðvíkjandi reinsiverkinum verður gjørt, og at reinsiverkið verður í bygningi, bygdur á matr. nr. 933a umleið sum sýnt á hjáløgdu tekning.

Samráðingar verða tiknar upp við eigaran um keyp av neyðugum lendi hesum viðvíkjandi.

Eigari av matr. nr. 933a er: *Eli Jensen, 695 Hellurnar*.

**Avgerð:**

Tilmæli frá teknisku nevndini varð samtykt, við tí ískoyti, at arbeiðið verður byrjað beinanvegin, og reinsiverkið verður tikið í nýtslu í 2007 . (9-0).

## Mál nr. 39/2006.

**Mál viðvíkjandi byggiætlan fram við vegnum Gjógvará/havnarlagið.**

Til viðgerðar var uppskot til byggiætlan fram við vegnum Gjógvará/havnarlagið, sum SP/F Teknistovan v/Eyðubni Petersen, arkitekti, 600 Saltangará hevur gjørt eftir áheitan frá teknisku nevndini.

Á býráðsfundi tann 15. juni 2006 gjøgnumgekk Eyðun Petersen fleiri uppskot, hann hevði gjørt. Í stórum var spurningurin, um byggjast skuldi í tveimum ella trimum hæddum yvir veghædd, og hvussu parkeringsviðurskiftini kundu verða loyst.

Avtalað varð, at býráðslimir skuldu hugsa, um hvørjir møguleikar eru best hóskandi, og at tekniska nevndin ger tilmæli til býráðið í málinum.

Á býráðsfundi tann 27. juni 2006 varð hetta mál enn einaferð til umrøðu.

Tekniska nevndin er samd um at arbeiða víðari við málinum at gera ásetingar um treytir fyri byggingina.

Málið hevur aftur verið til viðgerðar á fundi í teknisku nevndini tann 19. juli 2006. Í hesum sambandi møtti Eyðun Petersen til fundin. Jann Toftegaard metti seg ógjegnigan og fór av fundinum, tá hetta mál varð viðgjørt.
Broyttu tekningar frá Teknistovni hjá Eyðuni Petersen orðu gjøgnumgingnar.

Nevndin mælir býráðnum til, at bygt verður sambært fyriligjandi uppskoti frá Eyðuni Petersen, dagfest 28. juni 2006 og fyriliggjandi ásetingingum, dagfestum 19. juli 2006.

**Avgerð:**

Tilmæli frá teknisku nevndini varð samtykt. (8 atkv. fyri og 1 atkv. ímóti). Ímóti atkvøddi Kristina T. Larsen, sum bað um at fáa ført í gerðabókina, at hon atkvøddi ímóti, grundað á manglandi heildarloysn fyri byggisamtyktina. Hon førdi fram, at uppskot átti at verið gjørt av fleiri óheftum serkønum fólkum, har eitt nú ferðsluviðurskiftini skuldu verða trygg, áðrenn loyvi til bygging av íbúðum kann verða framd.

## Mál nr. 40/2006.

**Mál viðvíkjandi uppskoti til leigusáttmála og leigugjøld fyri egningarskúrar.**

Havnanevndin hevur á fundi tann 27. juli 2006 viðgjørt uppskot frá fyrisitingini til leigusáttmála og leigugjøld fyri egningarskúrar á havnarøkinum í nýggja bygninginum, sum kommunan hevur latið bygt.

Nevndin mælir býráðnum til at góðtaka fyriliggjandi uppskoti til leigusáttmála, og at leigugjaldið verður sambært fyriliggjandi útrokning, 3,4 mió kr. til 5% í rentu at gjalda yvir 20 ár.

***Avgerð:***

Samtykt varð at beina málið aftir í havnanevndini til viðgerðar, m.a. fyri at fáa tilvega útrokningartilfar, um afturrindanin av láninum varð 30 ár og harvið ávirkan á leigugjøldini. Somuleiðis vórðu nakrar treytir og orðingar av uppskotinum til leigusáttmála umrøddar, sum eisini áttu at verið viðgjørt av nevndini, áðrenn málið verður lagt aftur fyri komandi býráðsfund. (9-0).

**Mál nr. 41/2006.**

**Umsókn frá Símuni Lassaberg um byggiloyvi til sethús á matr. nr. 211e í Fuglafirði.**

Fuglafjarðar kommuna hevur móttikið umsókn frá Símuni Lassaberg, dagfest 07. august 2006 um byggiloyvi til sethús á matr. nr. 211e sunnan fyri Bakkageilina sambært hjáløgdum tekningum.

Málið hevur verið til viðgerðar á fundi í teknisku nevndini tann 30. august 2006, og mælir nevndin býráðnum til, at umsóknin verður gingin á møti soleiðis at:

1. Treytirnar í almennu byggisamtyktini fyri Fuglafjørð og kunngerð um brunaverju frá 9. apríl 1992 verða fylgdar.
2. Í hesum sambandi verður víst á, at øll búrúm skulu hava minst eitt vindeyga, sum kann verða latið upp við fríum opi, sum er minst 50 cm í breidd og 60 cm høgt. Hædd + breidd á tí fría opinum skulu vera minst 1,50 m..
3. Parkeringspláss til 2 bilar skal vera inni á stykkinum, og skal hetta verða gjørt, áðrenn flutt verður inn í húsini. Møguligt bilhús verður ikki roknað sum bilstøðil. Veggurin móti Bjarnavegi verður gjørdur í samráð við teknisku deild.
4. Ø 315 mm reinsibrunnur skal verða settur á báðar kloakkleiðingarnar, áðrenn hesir verða veittir út av grundstykkinum. Rottangi skal verða sambært leiðbeining frá Heilsufrøðisligu starvsstovuni og settur niður sambært vegleiðing um rottangauppseting.
5. Eisini skal rundskriv frá heilsufrøðisligu starvsstovuni, dagfest 02. juli 1998 viðvíkjandi nýtslu av tilfari til dren verða fylgd.
6. Kloakkplanur skal verða góðkendur av teknisku deild, og kloakkirnar skulu verða sýnaðar og góðkendar av teknisku deild, áðrenn tær verða tyrvdar.
7. Húsini skulu verða sett av teknisku deild.

**Avgerð:**

Tilmæli frá teknisku nevndini varð samtykt. (9-0).

**Mál nr. 42/2006.**

**Umsókn frá Agnari Lassaberg um byggiloyvi til sethús á matr. nr. 211f í Fuglafirði.**

Fuglafjarðar kommuna hevur móttikið umsókn frá Agnari Lassaberg, dagfest 17. juli 2006 um byggiloyvi til sethús á matr. nr. 211f sunnan fyri Bakkageilina sambært hjáløgdum tekningum.

Málið hevur verið til viðgerðar á fundi í teknisku nevndini tann 19. juli 2006, og mælir nevndin býráðnum til, at umsóknin verður gingin á møti soleiðis at:

1. Treytirnar í almennu byggisamtyktini fyri Fuglafjørð og kunngerð um brunaverju frá 9. apríl 1992 verða fylgdar.
2. Í hesum sambandi verður víst á, at øll búrúm skulu hava minst eitt vindeyga, sum kann verða latið upp við fríum opi, sum er minst 50 cm í breidd og 60 cm høgt. Hædd + breidd á tí fría opinum skulu vera minst 1,50 m..
3. Parkeringspláss til 2 bilar skal vera inni á stykkinum, og skal hetta verða gjørt, áðrenn flutt verður inn í húsini. Møguligt bilhús verður ikki roknað sum bilstøðil. Veggurin móti Bjarnavegi verður gjørdur í samráð við teknisku deild.
4. Ø 315 mm reinsibrunnur skal verða settur á báðar kloakkleiðingarnar, áðrenn hesir verða veittir út av grundstykkinum. Rottangi skal verða sambært leiðbeining frá Heilsufrøðisligu starvsstovuni og settur niður sambært vegleiðing um rottangauppseting.
5. Eisini skal rundskriv frá heilsufrøðisligu starvsstovuni, dagfest 02. juli 1998 viðvíkjandi nýtslu av tilfari til dren verða fylgd.
6. Kloakkplanur skal verða góðkendur av teknisku deild, og kloakkirnar skulu verða sýnaðar og góðkendar av teknisku deild, áðrenn tær verða tyrvdar.
7. Húsini skulu verða sett av teknisku deild.

**Avgerð:**

Tilmæli frá teknisku nevndini varð samtykt. (9-0).

**Mál nr. 43/2006.**

**Umsókn frá Annu og George Berjastein um byggiloyvi til sethús á matr. nr. 118b í Fuglafirði.**

Fuglafjarðar kommuna hevur móttikið umsókn frá Annu og George Berjastein, dagfest 01. august 2006 um byggiloyvi til sethús á matr. nr. 118b sunnan fyri Kirkjurygg sambært hjáløgdum tekningum.

Málið hevur verið til viðgerðar á fundi í teknisku nevndini tann 19. juli 2006, og mælir nevndin býráðnum til, at umsóknin verður gingin á møti soleiðis at:

1. Treytirnar í almennu byggisamtyktini fyri Fuglafjørð og kunngerð um brunaverju frá 9. apríl 1992 verða fylgdar.
2. Parkeringspláss til 2 bilar skal vera inni á stykkinum, og skal hetta verða gjørt, áðrenn flutt verður inn í húsini. Møguligt bilhús verður ikki roknað sum bilstøðil. Veggurin móti Bjarnavegi verður gjørdur í samráð við teknisku deild.
3. Ø 315 mm reinsibrunnur skal verða settur á báðar kloakkleiðingarnar, áðrenn hesir verða veittir út av grundstykkinum. Rottangi skal verða sambært leiðbeining frá Heilsufrøðisligu starvsstovuni og settur niður sambært vegleiðing um rottangauppseting.
4. Eisini skal rundskriv frá heilsufrøðisligu starvsstovuni, dagfest 02. juli 1998 viðvíkjandi nýtslu av tilfari til dren verða fylgd.
5. Kloakkplanur skal verða góðkendur av teknisku deild, og kloakkirnar skulu verða sýnaðar og góðkendar av teknisku deild, áðrenn tær verða tyrvdar.
6. Húsini skulu verða sett av teknisku deild.
7. Ùtgrevstrar- og planeringsarbeiðið skal verða gjørt soleiðis, at fortovskantur og vegur ikki verða skadd, og einki tilfar frá útgrevstrinum verður sløtt eftir vegnum og á landsvegin, har moldin verður løgd á kambsdali. Um hetta kemur fyri, skal tilfarið verða tikið upp beinanvegin, og møguligar skaðar umvældir.

8. Tá ið háspenningarkaðal liggur umleið 2,5 m inni á stykkinum heimanfyri mark móti matr. nr. 105, er loyvið treytað av, at grevstrar-og møguligt spreingiarbeiði verður gjørt soleiðis, at hesin kaðal verður liggjandi óskalaður. Eisini skal stykkið skipast soleiðis, at hesin kaðal framyvir verður liggjandi órørdur.
9. Byggiloyvið er tíðaravmarkað til 2 ár frá útskrivingardegnum.

**Avgerð:**

Tilmæli frá teknisku nevndini varð samtykt. (9-0).

**Mál nr. 44/2006.**

**Umsókn frá Helen á Lakjuni og Rúna Jacobsen um byggiloyvi til sethús á matr. nr. 494 í Fuglafirði.**

Fuglafjarðar kommuna hevur móttikið umsókn frá Helen á Lakjuni og Rúna Jacobsen, dagfest 24. august 2006 um byggiloyvi til sethús á matr. nr. 494 Vesturi í Bø sambært hjáløgdum tekningum.

Málið hevur verið til viðgerðar á fundi í teknisku nevndini tann 30. august 2006, og mælir nevndin býráðnum til, at umsóknin verður gingin á møti soleiðis at:

1. Treytirnar í almennu byggisamtyktini fyri Fuglafjørð og kunngerð um brunaverju frá 9. apríl 1992 verða fylgdar.
2. Parkeringspláss til 2 bilar skal vera inni á stykkinum, og skal hetta verða gjørt, áðrenn flutt verður inn í húsini. Møguligt bilhús verður ikki roknað sum bilstøðil. Veggurin móti Bjarnavegi verður gjørdur í samráð við teknisku deild.
3. Ø 315 mm reinsibrunnur skal verða settur á báðar kloakkleiðingarnar, áðrenn hesir verða veittir út av grundstykkinum. Rottangi skal verða sambært leiðbeining frá Heilsufrøðisligu starvsstovuni og settur niður sambært vegleiðing um rottangauppseting.
4. Eisini skal rundskriv frá heilsufrøðisligu starvsstovuni, dagfest 02. juli 1998 viðvíkjandi nýtslu av tilfari til dren verða fylgd.
5. Kloakkplanur skal verða góðkendur av teknisku deild, og kloakkirnar skulu verða sýnaðar og góðkendar av teknisku deild, áðrenn tær verða tyrvdar.
6. Húsini skulu verða sett av teknisku deild.
7. Ùtgrevstrar- og planeringsarbeiðið skal verða gjørt soleiðis, at fortovskantur og vegur ikki verða skadd, og einki tilfar frá útgrevstrinum verður sløtt eftir vegnum og á landsvegin, har moldin verður løgd á kambsdali. Um hetta kemur fyri, skal tilfarið verða tikið upp beinanvegin, og møguligar skaðar umvældir.
8. Tá ein innilokað kloakk gongur gjøgnum stykkið, skilar kommunan sær rætt til í sambandi við jørðarbeiði, at gera neyðugt kloakkarbeiði.
9. Byggiloyvið er tíðaravmarkað til 2 ár frá útskrivingardegnum.

**Avgerð:**

Tilmæli frá teknisku nevndini varð samtykt. (9-0).

Meðan málið varð viðgjørt, var Eyðun á Lakjuni ikki á fundi vegna ógjegni.

## Mál nr. 45/2006.

## Mál viðvíkjandi frítíðarundirvísingini veturin 2006-2007.

Fuglafjarðar kommuna hevur móttikið skriv frá Fuglafjarðar skúla, dagfest 22. august 2006 saman við uppskoti til frítíðarundirvísing veturin 2006-2007, og hvar heitt verður á kommununa vegna skúlan um at søkja Mentamálastýrið um at fáa játtaðan stuðul svarandi til hjáløgdu meting, sum í peningi er kr. 297.000,00.

Hetta svarar til eitt undirvísingartímatal upp á 2.200 tímar. Veturin 2003-2004 brúkti skúlin umleið 1.300 tímar, meðan skúlin hevur nýtt 1.580 tímar veturin 2004-2005 og útvið 1.600 tímar veturin 2005-2006.

Somuleiðis søkir skúlin um heimildir sjálvur at taka støðu til onnur tilboð, um so verður, at okkurt av tilboðunum fella burtur, t.d. av ov lítlari undirtøku. Eisini verður biðið um at fáa heimild at laga tímatalið til lærugreinarnar, um so verður, at fullur stuðul ikki verður veittur av Mentamálastýrinum.

Mælt verður eisini til, at luttøkugjaldið verður kr. 200,00, um skeiðið er styttri enn 40 tímar og kr. 400,00 um skeiðið er longri enn 40 tímar + kr. 2,00 pr. tíma.

Eisini verður mælt til, at kommunan avsetir kr. 40.000,00 á konto 410020 til at nýta til kunngerðir og møguliga útgerð.

Kvøldskúlin hugsar sær at lýsa við nevndu tilboðum um miðjan september 2006.

Málið hevur verið til viðgerðar á fundi í mentamálanevndini 06. september 2006, og mælir nevndin mælir býráðnum til at góðkenna uppskotið frá Fuglafjarðar kvøldskúla til frítíðarundirvísing veturin 2006-2007, og at býráðið søkir Mentamálastýrið um stuðul upp á kr. 297.000,00 svarandi til 2.200 undirvísingartímar. (Almenn frítíðarundirvísing 1.720 tímar + frítíðarvirksemi 480 tímar).

Kommunan rindar 50% av lønunum til lærarar í sambandi við vanliga frítíðarundirvísing, meðan Mentamálaráðið rindar hina helvtina. Ráðið rindar allar lønir til serstaka frítíðarundirvísing mett 213 undirvísingartímar.

Eisini verður mælt til, at skúlin fær heimild til at tillaga tímatalið til lærugreinarnar, um so verður, at fullur stuðul ikki verður veittur, og at skúlin somuleiðis fær heimild til sjálvur at taka støðu til onnur tilboð, um okkurt av tilboðunum av ymiskum orsøkum falla burtur.

Mælt verður býráðnum til, at luttøkugjaldið verður sum skotið verður upp kr. 200,00 fyri skeið styttri enn 40 tímar og kr. 400,00 fyri skeið longri enn 40 tímar + kr. 2,00 pr. tíma, galdandi frá 01. september 2006 at rokna.

Á fíggjarætlan kommununar fyri 2006 eru avsettar kr. 25.000,00 á konto 410020 "Kvøldskúlin aðara útreiðslur", og nýttar eru kr. 15.217,54 pr. 06. september 2006 . Nevndin er sinnað til at heita á fíggjarnevndina um at avseta kr. 40.000,00 á fíggjarætlan kommununar fyri 2007.

**Avgerð:**

Tilmæli frá mentamálanevndini varð samtykt. (9-0).

**<u>Mál ntr. 46/2006.</u>**

**Viðvíkjandi vali av upptøkunevnd fyri Eldrasambýlið.**

Vísandi til § 3, stk. 2.1 í "Kunngerð nr. 67 frá 18. mei 2006 um eldrasambýli, broytt við kunngerð nr. 71 frá 30. mei 2006, stendur, at avgerð um upptøku á eldrasambýli verður tikin av eini upptøkunevnd við 5 limum.

Í upptøkunevndina verða hesi vald:

1. Trý umboð við røktarfaklinagri útbúgving, tilnevnd av kommununi.
2. Avvarðandi økisleiðari í Heimarøktini.
3. Ein kommunulækni, tilnevndur av landsstýrismanninum.

Í skrivi frá Almanna- og heilsumálaráðnum til kommununa, dagfest 28. juni 2006 verður heitt á kommununa um at velja 3 umboð í seinasta lagi 30. august 2006, samstundis sum ráðið skal verða kunnað um, hvørji hesi eru.

Gjørt verður í skrivinum vart við, at kommunalu umboðini skulu hava eina røktarfakliga útbúgving, tað vil siga, at einans sjúkrarøktarfrøðingar, heilsurøktarar og heilsuhjálparar kunnu umboða kommununa í upptøkunevndini. Frávik kunnu ikki verða gjørd.

Málið hevur verið til viðgerðar á fundi í sosialu nevndini tann 07. september 2006, og gav nevndin borgaratjóranum og formanninum ío nevndini heimild til at koma við uppskoti til nevndarlimir.

Tilmælið verður lagt fyri komandi býráðsfund, sum eftir ætlan verður tann 14. september 2006.

Omanfyri nevndu eru tann 08. september 2006 vornir samdir um at mæla býráðnum til at velja niðanfyri standandi kommunalu umboð í upptøkunevndina fyri eldrasambýlið "Vesturstovu":

- Unna Næs Petersen, sjúkrarøktarfrøðingur
- Kristbjørg Petersen, sjúkrarøktarfrøðingur
- Marianna Hansen, sjúkrarøktarfrøðingur

**Avgerð:**

Samtykt varð at velja omanfyri standani oersónar sum kommunalu umboðini í upptøkunevndina fyri eldrasambýli Vesturstovu verandi valskeið, t.v.s. fram til 31. desember 2008. (9-0).

Bókin lisin. Fundurin lokin kl. 20.30.

| | |
|---|---|
| Gordon M. Petersen | Jóhan Hansen |
| Dánjal Vang | Jón Nolsøe Olsen |
| Signar á Brúnni | Petur Abrahamsen |
| Kristina T. Larsen | Sigurð S. Simonsen |
| Eyðun á Lakjuni | |